# Hagstova Føroya

Hagstovan sóknast eftir tveimum fólkum við útbúging frá hægri lærustovni ella tilsvarandi førleika, til at arbeiða við búskaparhagtølum.

**Gjaldsjavnin** og stakpartarnir av honum: Rakstrarparturin við inn- og útflutningi av vørum og tænastum, rentugjaldingum, lønum o.ø. og kapitalparturin við broytingum í nettoskuld til útlond.

**Vinnugreinahagtøl** – serliga roknskaparhagtøl. Hetta eru stakroyndir av virkisroknskapum, sum eru grundarlag fyri uppgerðum av virðisøkingini í marknaðarliga virkseminum í landinum, skift á vinnugreinir.

Bæði arbeiðsøkini verða samskipað í tjóðarroknskapin, og kann tí roknast við heilt sjálvstøðugum arbeiði eins og samskipaðum arbeiði í verkætlanarbólkinum um tjóðarroknskapin.

Bæði starvsfólkini skulu seta seg føran fyri at læra at arbeiða við forriting úr datagrunni. Vit arbeiða við SQL forriting í sambandi við ORACLE datagrunn, sum tó ikki er ein treyt at duga frammanundan.

Bæði starvsfólkini skulu hava hollan kunnleika um samfelagsbúskap, hagfrøði, skráseting og dataviðgerð.

Løn verður latin eftir sáttmála millum avvarðandi fakfelag og Landsstýrið.

Umsóknarfreistin er **1. februar 2002**, og skal umsóknin sendast

**Hagstovu Føroya**
Postbox 2068
165 Argir.

Meira fæst at vita um størvini frá Hermanni Oskarssyni á Hagstovu Føroya, telefon 352800 og teldupostur hermann@hagstova.fo

# Blákrossheimið søkir eftir sjúkrasystir

Søkt verður eftir sjúkrasystir til Blákrossheimið at byrja 16.01.2001.
Talan er um eitt avloysarastarv vegna barnsburð uppá 0,9 tíð í skiftandi vaktum. Starvið er tíðaravmarkað til 30.06.2002.

**Starvið umfatar**
Ábyrgd fyri sjúkraræktarligu uppgávunum í samband við avrúsan og viðgerðir á heiminum. Harumframt eru nøkur praktist ábyrgdarøki knýtt at starvinum.

Vit vænta at tú tekur undir við blákrosshugsjónini, sum er bygd á kristið grundstøði.

**Setanarviðurskifti**
Løn- og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Almannna- og heilsumálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

Nærri fæst at vita starvinum viðvíkjandi á tlf. 315575 frá Olgu Magnussen, leiðara.

**Umsóknir**
Umsókn við aviriti av prógvum og ummælum, sum skal stílast til Nevndina fyri Blákrossheimið verða at senda innan 14.01.2001 til:

**Blákrossheimið**
Lynggøta 12
100 Tórshavn
Tlf. 315575
Fax: 315567
E-mail: blakross@blakross.fo

Blákrossheimið, ið er eitt viðgerðarheim fyri rúsevnismisnýtarar, er stovnsett av Bláa Krossi Føroya við góðkenning frá Føroya Landsstýri. Á heiminum eru 11,5 starvsfólk. Pláss er fyri 15 búfólkum. Eisini eru búfelagsskapir og eftirviðgerð knýtt at heiminum. Blákrossheimið verður fíggjað við árligari játtan frá landsstýrinum.
Blái Krossur Føroya er ein kristiligur hjálparfelagsskapur, sum hevur til endamáls at hjálpa menniskjum, ið eru illa stødd av rúsdrekkaávum, at fyribyrgja misnýtslu av rúsdrekka og øðrum rúsandi evnum, at virka fyri eini rúsfríari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi, at boða gleðiboðskapin um Guds kærleika til menniskju.

# Blákrossheimið søkir eftir starvsfólki

Søkt verður eftir fólki við hóskandi útbúgving til Blákrossheimið at byrja sum skjótast. Talan er um fulltíðarstarv í skiftandi vaktum fram til 31/12-02.

**Hóskandi útbúgving**
- Sosialráðgevi
- Lærari
- Alkoholráðgevi
- Diakon
- Pedagogur

Tað er eisini ein fyrimunur, hevur tú eina terapeutiska útbúgving og royndir innan rúsdrekkaviðgerð.

**Starvið umfatar**
At assistera í móttøkuni og verða um búfólk sum eru í avrúsanini. Verða við í viðgerðararbeiðinum og eftirviðgerðarbólkinum. Harumframt eru nøkur praktist ábyrgdarøki knýtt at starvinum.

Hevur tú áræði, tekur undir við blákrosshugsjónini, hevur ynski um at arbeiða við menniskjum er tað tú vit søkja.

**Setanarviðurskifti**
Løn- og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Almanna- og heilsumálastýri og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita starvinum viðvíkjandi á tlf. 315575 frá Olgu Magnussen, leiðara.

**Umsóknir**
Umsókn við avriti av møguligum prógvum og ummælum, sum skal stílast til Nevndina fyri Blákrossheimið, verða at senda innan 14.01.2002 til:

**Blákrossheimið**
Lynggøta 12
100 Tórshavn
Tlf. 315575
Fax: 315567
E-mail: blakross@blakross.fo

Blákrossheimið, ið er eitt viðgerðarheim fyri rúsevnismisnýtarar, er stovnsett av Bláa Krossi Føroya við góðkenning frá Føroya Landsstýri. Á heiminum eru 11,5 starvsfólk. Pláss er fyri 15 búfólkum. Eisini eru búfelagsskapir og eftirviðgerð knýtt at heiminum. Blákrossheimið verður fíggjað við árligari játtan frá landsstýrinum.
Blái Krossur Føroya er ein kristiligur hjálparfelagsskapur, sum hevur til endamáls at hjálpa menniskjum, ið eru illa stødd av rúsdrekkaávum, at fyribyrgja misnýtslu av rúsdrekka og øðrum rúsandi evnum, at virka fyri eini rúsfríari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi, at boða gleðiboðskapin um Guds kærleika til menniskju.


ROTTANGAR




**pf Maria Poulsen**
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000
Sosialurin 311820


# Fólk søkist

Fólk søkist til at standa í sølubúðini umborð á Ternuni um Vestmannasund.
Møguleikí er fyri at arbeiða 1 viku og hava eina viku frí fyri fasta løn.
Løn sambært avtalu.
Áhugaði kunnu ringja á **tlf. 211099** ella **361299**.


Sosialurin
-tað loysir seg

**Nýggjar TANNPROTESUR**
Broytingar og umvælingar av gomlum protesum
Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16





Klubbadansur
Leygarkvøldið spælir
DRIV
Havnar Klubbi: staðið, har fólk møtir áðrenn tað er tíð at fara heim
HAVNAR KLUBBI Stovnaður 1799
Sosialurin - 311820

Lesið internet Sosialin !





# Fólk til kiosk Activ

Sókt verður eftir fólki til seinnapartsarbeiði at byrja beinanvegin.

**Kiosk Activ**
J. Bronckgøta
Tlf. 313740
Fax 316540


**Vit hava m.m.a.**

| | |
|---|---|
| Rista Baguette | 42,- |
| v/ ost & skinku | |
| v/ ost & kalkun | |
| Baguette | 45,- |
| v/ kylling & bacon | |
| v/ost & skinku | |
| v/ost & kalkun | |

*livandi tónleikur*
CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25
Sosialurin 311820

Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo




**BØKUR, BØKUR, BØKUR**
og alt annað prent

Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo

Sosialurin
-tað loysir seg

Restorff's ASSU


**Toll- og Skattstova Føroya**

# Fyribilsskattaskráin 2002 Fríir ágóðar v.m.

Hjá teimum, sum hava ymisk framíhjárættindi sum part av lønini, ásetir Toll- og Skattaráð Føroya eina ferð um árið virðið á hesum lunnindum, og eru virðini fyri 2002 hesi, íroknað meirvirðisgjald:

| | | | |
|---|---|---|---|
| a) | Virðið á fríum bústaði: | | |
| | íbúð (partur av húsum) pr. m² | kr. | 441 |
| | íbúð (heil hús) pr. m2 | kr. | 347 |
| b) | Eginnýtsla av el | kr. | 6.700 |
| c) | Eginnýtsla av olju | kr. | 13.800 |
| d) | Frí telefon | kr. | 4.500 |
| e) | Virðið á fríum kosti pr. dag: | | |
| | 3 máltíðir | kr. | 85 |
| | 2 máltíðir | kr. | 65 |
| | 1 máltíð | kr. | 47 |
| f) | Virðið á fríum bili: | | |
| | 1100 kg og undir | kr. | 43.500 |
| | 1101 kg til 1300 kg | kr. | 54.000 |
| | 1301 kg og meira | kr. | 66.000 |
| | Allir aðrir bilar, sí viðmerking til "Allir aðrir bilar" | kr. | 32.625/21.750 |

**Eginnýtsla hjá privatum vinnurekandi**
Privatur vinnurekandi skal skatta av virðinum á vørum og framleiðslum, sum hann tekur úr virki sínum at nýta ella at hava í húsarhaldi sínum ella til gávur. Virðið verður roknað eftir keypsvirðinum ella framleiðsluvirðinum á hesum vørum.

Somuleiðis skal privatur vinnurekandi skatta av tí partinum av útreiðslunum, sum svarar til privatnýtsluna, tá tað snýr seg um t.d. bil, telefon, ljós og hita, har útreiðslurnar umfata bæði privatu og vinnuligu nýtsluna.

Meginreglan er tann, at skattgjaldarin sjálvur skal gera eina neyva metan av, hvussu nógv er privat, og hvussu nógv er vinnulig nýtsla, og skal henda metan vera við atliti til støðd á t.d. húsi og húski.

Sum leiðbeinandi minstamark hevur Toll- og Skattaráð Føroya tí ásett hesi virði fyri nýttar vørur:

| | | | |
|---|---|---|---|
| g) | Eginnýtsla av vørum: | | |
| | Bakarar | kr. | 6.700 |
| | Bakarar við keypmansvørum | kr. | 8.800 |
| | Keypmenn | kr. | 23.300 |
| | Privatnýtsla av bili/bussi upp til 10 persónar hjá hýruvognsførarum | kr. | 16.000 |
| h) | Renta á partaeigaralánum hjá høvuðspartaeigarum: | | 9% |
| i) | Kapitaleftirlønarfrádrátturin er hægst | kr. | 43.500 |
| j) | Skattafrítøka fyri donsk lesandi | kr. | 62.000 |

**Viðmerking til "Allir aðrir bilar" undir f)**
Omanfyri nevndu upphæddir eru galdandi fyri bilar skrásettir sum persónvognar smb. § 3 í ll. nr. 175 frá 18.12.1992 um skrásetingargjald á motorakførum.

Fyri bilar skrásettir sum vørubilar eftir § 5 í ll. nr. 175 frá 18.12.1992 um skrásetingargjald á motorakførum verður virðið sett til 75% av upphæddini fyri bilar undir 1100 kg.

Fyri aðrar bilar enn omanfyri nevndu t.d. bilar skrásettir eftir § 6 og § 8 í ll. nr. 175 frá 18.12.1992 um skrásetingargjald á motorakførum verður virðið sett til 50% av upphæddini fyri bilar undir 1100 kg.

Toll- og Skattstova Føroya tilskilar sær rætt at krevja avrit av skrásetingarskjalinum fyri bilin.

Tórshavn, 19. desember 2001

**Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið**